B36-KÍ 2-4 (2-1)

Kí vann oddadyst

Við sannførandi spælið í seinna hálvleiki, staðfestu KÍ-kvinnurnar støðu sína sum oddalið í bestu kvinnudeildini

1.DEILD KVINNUR
Páll Holm Johannesen

KÍ-kvinnurnar vóru um vikuskiftið á vitjan í Gundadali, har mótstøðuliðið var B36. Fyri góðari viku síðan taptu klaksvíkskvinnur sín fyrsta dyst í ár, og tí var tað týdningarmikið, at tær reistu seg ímóti B36. Uppreisnina fingu tær eisini, tí tá dómarin floytaði dystin av, høvdu klaksvíkskvinnur vunnið 4-2.

Fyrri hálvleikur gekk javnt á, har møguleikar vóru á bæði málini. Serliga fyrstu løtuna lá væl fyri hjá B36-kvinnunum, tá 20 minuttir vóru farnir av dystinum, hevði tað eydnast teimum at skjóta tvey mál. Fyrra málið fall eftir góðar 10 minuttir. B36 roynir seg við skoti útifrá, sum KÍ-málverjin ikki fær hildið, og Súsanna Hansen fylgir upp og leggur havnaliðið á odda 1-0. Hesa løtuna var gott spæl frá báðum liðum, men B36-kvinnurnar vóru avgjørdari framman fyri málinum. Tá 20 minuttir vóru farnir av dystinum, økti Sólva Joensen um B36-leiðsluna. KÍ- verjuleikari og málverji miskilja hvønn annan, og Sólva kemur ímillum, og ótarnað kann hon seta bóltin í netið.

KÍ vann leygardagin oddadystin ímóti B36 í Gundadali

Mynd: savnsmynd

KÍ svarar aftur

Eftir hetta tóku B36-kvinnurnar seg nakað aftur á vøllin, fyri at verja um leiðsluna, og hetta gav KÍ-kvinnunum betri pláss. KÍ trýstu eisini B36 nakað, og stutt fyri hálvleik, eydnaðist tað teimum at m inka um munin. Rannvá Andreasen kemur at standa væl fyri beint uttanfyri B36-brotsteigin, og við góðum skoti, minkar hon um munin. 2-1 til B36 gjørdist eisini hálvleiksstøðan í Gundadali.

Meðan liðini høvdu líka nógv spæl í fyrra hálvleiki, so hevði KÍ yvirvág í spæli í seinna hálvleiki. Tær vóru bæði grammari, og vunnu flestu nærdystirnar. Dysturin var avgjørt ein teimum betru í kvinnudeildini í ár, har bæði liðini royndu at spæla fótbólt, og spælferðin var høg. Hóast KÍ hevði yvirvág í seinna hálvleiki, so hildu B36-kvinnurnar fram við at spæla fótbólt.

Tá 10 minuttir vóru farnir av seinna hálvleiki, javnaði KÍ. Joan M. Joensen fær ein langa sending, og hon rennur frá B36-verjuni, og tá málverjin kemur ímóti, lyftir hon bóltin uppum hana til 2-2. Stutt eftir útjavnadi málið, var Joan M. Joensen aftur uppá spæl. Rannvá Andreasen brýtur ígjognum í vinstru, og finnur Joan, sum so leggur KÍ frammum. Kí hevði fleiri møguleikar at økja um leiðsluna, men tær vóru ikki nóg kaldar frammanfyri málinum. 10 minuttir fyri leiklok staðfesti Malena Josephsen KÍ-sigurin , eftir hon varð spæld leys, og vælstødd inni í B36-brotsteiginum, kundi hon okja til 4-2.

Bæði úr Klaksvík og Havn verður sagt, at dysturin varð vælleiliktur, og mundi vera ein av teimum heilt frægu dystinum í ár. Leikararnir tordu at halda uppá bóltin, og fá mistøk vórðu framd í dystinum. Við sigrinum endar KÍ ovast, og fær 3 stig við í endaspælið. B36 endar á øðrum plássi, og verður eitt stig aftanfyri KÍ, tá endaspælið byrjar í august.

Síggja fram til steypafinaluna

Meðan B36-kvinnurnar eru farnar í summarfrí, so skulu KÍ spæla steypafinalu á ólavsøku. Næstu 14 dagarnar binda tær fri, og so verður vant dúgliga fram ímóti steypafinaluni ímóti HB. KÍ-kvinnurnar taptu steypfinaluna í fjør, og tí verða KÍ-kvinnurnar eyka uppsettar til júst finaluna ímóti HB á ólavsøku.

B36-KÍ 2-4 (2-1)
1-0 Súsanna Hansen
2-0 Sólva Joensen
2-1 Rannvá Andreasen
2-2 Joan M. Joensen
2-3 Joan M. Joensen
2-4 Malena Josephsen

1. deild kvinnur

		d	v - j - t	v mál	t mál	+/-	stig
1	KÍ	8	7 - 0 - 1	43	8	35	21
2	B36	8	5 - 0 - 3	19	12	7	15
3	B68	8	5 - 0 - 3	21	15	6	15
4	HB	8	2 - 1 - 5	14	29	-15	7
5	GÍ	8	0 - 1 - 7	9	42	-33	1

Stig við í endaspælið

Kí	3 stig
B36	2
B68	1
HB	1

Gí leikar upp- og niðurflytingardyst ímóti nummar tvey í 2.deild. Vinnarin fær eitt stig við sær í endaspælið

Máltindurin

Rannvá Andreasen	KÍ	16
Malena Jospehsen	KÍ	10
Vivian Rasmussen	KÍ	8
Ása á Neystabø	B36	6
Irdi Hansen	B68	6
Malan á Dunga	HB	6
Súsanna Hansen	B36	5
Laila Enghamar	B36	4
Maibritt S. Olsen	B68	4
Linda Joensen	B68	3
Eyðvør Thomsen	HB	3
Selma D. Erol	B36	2
Lív Hansen	B68	2
Mary-Ann Isaksen	B68	2
Anja Klæmintsdóttir	GÍ	2
Hansa Mikkelsen	GÍ	2
Heidi Jacobsen	GÍ	2
Ása í Dímun	HB	2
Eyðfríð Kristiansen	HB	2
Elsa Maria Simonsen	KÍ	2
Jensa Sirdal	KÍ	2
Joan M. Joensen	KÍ	2
Arnbjørg Danielsen	B36	1
Sólvá Joensen	B36	1
Frida Andreasen	B68	1
Hansy Davidsen	B68	1
Heidi í Hjøllum	B68	1
Helen á Lakjuni	B68	1
Judy Justinussen	GÍ	1
Maria Zachariasen	GÍ	1
Gunn Müller	HB	1
Bára Skaale	KÍ	1
Marian Joensen	KÍ	1
Sjálvmál		2

B68-HB 7-0 (5-0)

B68 stórsigur á HB

Toftakvinnur hava nú vunnið seinastu fýra dystirnar, og spennandi verður at fylgja teimum í endaspælinum

1. DEILD KVINNUR
Páll Holm Johannesen

Toftakvinnur fingu vitjan av HB fríggjadagin, og havnakvinnur vórðu sendar suðuraftur við einum stórtapi. B68 byrjaði sum eitt ódnarveður, og tá eitt korter var farið av dystinum, vóru tær longu á odda 3-0. Tað gekk rímuliga javnt á fyrsta korterið, men eftir tað tríðja málið hjá B68, fór luftin fullkomiliga úr havnarkvinnum. B68 hevði greiða yvirvág í spæli, tað, ið írestaði av dystinum. Álopini skolaðu oman ímóti HB-málinum, og høvdu toftakvinnur verið hepnari frammanfyri HB-málinum, hevði sigurin verið nógv størri, verður sagt av Toftum. Serliga í fyrra hálvleiki var stórur munur á liðunum, og tá farið var til hálvleiks, var støðan eisini 5-0 til heimaliðið. Málini fyri heimaliðið í fyrra hálvleiki skutu, Maibritt Olsen 2, Linda Joensen 2 og Hansy Davidsen.

Tamari seinni hálvleikur

Eftir so greiðari hálvleiksleiðslu, løgdu toftakvinnur ikki líka nógv fyri í seinna hálvleiki. Ferðin í spælinum fór eisini niður í seinna hálvleiki, og longri varð ímillum málmøguleikarnir. Tó so, tað eydnaðist B68 at skjóta tvey mál í seinna hálvleiki. Eftir góðan tíma økti Heidi í Hjøllum um leiðsluna, og 15.minuttir setti Frida Andreasen punktum fyri málveitsluni. Úr Havn verður sagt, at dysturin sum so, ikki hevði tann stóra týdningin, og at fleiri lyklaleikarar ikki vóru við, og tí gekk tað sum tað gekk. Tær leggja aftrat, at B68 spældi vel fríggjadagin og var avgjørt betra liðið.

B68 vunnið seinastu fýra dystirnar

Toftakvinnur hava gjørt eitt rættiligt hál seinastu dystirnar. Øll oddaliðini hava tapt á Svangaskarði, meðan tað hevur gingið heldur striltið á útivølli. Seinastu fýra dystirnar hava toftakvinnur fingið fulla úrtøku, og endaðu tær eisini á einum triðja plássi í grundspælinum. Liðið er ungt og evnaríkt, og spennandi verður, um B68 fer at gera seg galdandi heilt í oddinum eftir summarfrítíðina.

B68-HB 7-0 (5-0)
1-0 Maibritt Olsen
2-0 Hansy Davidsen
3-0 Linda Joensen
4-0 Maibritt Olsen
5-0 Linda Joensen
6-0 Heidi í Hjøllum
7-0 Frida Andreasen

Oyndarfjarðar skúli

Søkt verður eftir vikari skúlaárið 2002/03. Tíðaravmarkað frá 1/8 - 02 til 30/6 - 03. 11 tímar um vikuna. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til skúlaleiðaran, tlf. 444673, ella skúlastýrisformannin, tlf. 444462, í seinasta lagi 20/08 - 02.

Oyndarfjarðar skúlastýrið
v/Gretu Magnussen
690 Oyndarfjørður

KFUM & KFUK í Havn

søkir pr. 1. august 2002 eftir ungdómsleiðara, m/k.

Arbeiðið umfatar:
- saman við teimum ungu at skipa fyri TenSingarbeiðinum, sum m.a. umfatar kórið »Sound of Glory«.
- í samráð við felagsskrivara og nevnd at hjálpa til og skipa fyri ungdómsarbeiðinum í feløgunum.

Vit ynskja:
- at tú dugir at arbeiða við fólki,
- kann arbeiða sjálvstøðugt,
- kann samstarva við skrivara og onnur, ið gera eitt sjálvboði arbeiði í feløgunum,
- at tú tekur undir við endamálinum hjá feløgunum
- at tú hevur áræði at taka upp nýggjar tættir í arbeiðinum.

Umsóknarfreist: 15. juli 2002.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til felagsskrivaran Louisu Niclasen í KFUK, tlf. 311928 ella 211824.

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3390
Navn: Sp/f A. P. Busskoyring
Adressa: 513 Syðrugøta
Kommuna: Gøtu Kommuna
Stovningardato: 25.06.2002
Viðtøkudato: 25.06.2002
Kapitalur: Kr. 162.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kr. 162.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnari: Andreas Poulsen, 513 Syðrugøta.
Stjórn: Andreas Poulsen, 513 Syðrugøta.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av stjóranum.
Grannskoðari: : Sp/f Grannskoðarastovan á Skála, 480 Skáli.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 01.01.2002 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil, busskoyring o.a.í hesum sambandi.
Felagið er stovnað við umskipan av virki eftir umskipanarlógini.

Skráseting Føroya tann 1. juli 2002

Kristin Balle

Mentamálaráðið

Móttøka

Í sambandi við, at hølini í Mentamálaráðnum eru liðugt innrættað, verður almenn móttøka í Mentamálaráðnum, Hoyvíksvegi 72,

mikudagin 3. juli 2002, kl. 15-17

Í forhøllini er gjørdur mentanarveggur, har ætlanin er at skipa fyri sýningum av ymsum listaverkum. Fyrsta sýningin letur upp nevnda dag, har listakvinnan Guðrið Poulsen sýnir fram lutir úr leiri.

Høvi verður eisini at heilsa uppá nýggja landsstýrismannin.

Mentamálaráðið

Mentamálaráðið hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi. Mentamálaráðið er skipað í tríggjar deildir – Mentamáladeild, Fólkaskúladeild og Vinnu- og miðnámsskúladeild umframt einari fyrisitingardeild.

Sosialurin
-tað loysir seg

Lærari/ Vikarur

Søkt verður eftir lærara/ vikari til Svínoyar skúla at undirvísa 14 tímar um vikuna skúlaárið 2002/2003.

Vegna skúlastýrið
Hanna Jacobsen
tlf. 451218

Lærlingur

Hevur tú hug at útbúgva teg innan rørfakið?

Vit hava eitt læruplass leyst at søkja.

Tú kemur at hava høvuðstilknýti til arbeiðsplass okkara á Glyvrum.

Hevur hetta tín áhuga, ert tú vælkomin at ringja til Hans Jákup, tlf. 228135.

Reno-Vent Sp/f
Bakkavegur 12
FO-600 Glyvrar

Reno-Vent Sp/f er ein miðalstór HVS-fyritøka við nógvum, fjølbroyttum arbeiðsuppgávum kring alt landið.

Handverkarar

Søkt verður eftir handverkarum at arbeiða innan HVS og smiðjuyrkið í miðstaðarøkinum, Eysturoy og norðoyggjum.

Hevur hetta tín áhuga, ert tú vælkomin at ringja til Hans Jákup, tlf. 228135.

Reno-Vent Sp/f
Bakkavegur 12
FO-600 Glyvrar

Reno-Vent Sp/f er ein miðalstór HVS-fyritøka við nógvum, fjølbroyttum arbeiðsuppgávum kring alt landið.

Summarútsølan er byrjað

Stásið tlf. 320626

Sosialurin -tað loysir seg

Lærari/Vikarur

Søkt verður eftir lærara/vikari til Mikladals skúla í tíðaravmarkað fulltíðarstarv skúlaárið 2002/2003.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Møguligar umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi tann 8. juli.

Lærarahús í góðum standi eru í bygdini.